# Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 19. juni 2024, kl. 17.00

| | |
|---|---|
| **Bygdarráðslimir á fundi:** | Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Laila Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen. |
| **Skrivari:** | Rúna Ingunardóttir |

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Anja Haldansen frá 1. juni 2024 frá at henni barst frá at møta á fundinum.
1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarsboð 3. juni 2024 og játtaði at møta.

Pauli T. Petersen møtti ikki á fundinum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 290**
Eykajáttan til brunatrygd
J.nr.: 30102-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 12. juni mál um brunatrygd í Vestmanna skúla.

Leiðandi húsavørðurin mælir til at Vestmanna kommuna dagførir alarmskipanina í skúlanum og høllini.

Kostnaðurin er kr. 149.216 sambært tilboðið frá El-Net. Hetta er ein skipan, sum eisini arbeiðir saman við lásaskipanini.

Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eina eykajáttan.

**Viðv. 290**
Eykajáttanin á kr. 149.216 varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 291**
Endurgjald fyri manglandi barnaansing
J.nr.: 10000019-2-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 12. juni 2024 mál um endurgjald fyri manglandi barnaansing ísmb. við verkfall.

Eingin barnaansing var í Gjáarlon og Látipípuni í 3 vikur.
Frítíðaransingin og Skúlabólkurin vóru ikki ávirkað av verkfallinum.

Nevndin mælir til at lata endurgjald fyri manglandi barnaansing. Nevndin mælir eisini til, at gjaldið verður mótroknað við gjaldsskipanini, at tey einans gjalda fyri eitt barn, og at kr. 60.000 verða játtaðar við eini eykajáttan.

**Viðv. 291**
Eykajáttanin á kr. 60.000 varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 292**
Keyp av neystalendi
J.nr.: 8202002-4-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 12. juni 2024 umsókn frá John Martin og Dánjal Jákup Andreassen um keyp av lendi uppí neystalendið matr. nr. 50e.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmælið frá Teknisku Nevnd á fundi tann 12. juni 2024.

Nevndin samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku Nevnd. Nevndin mælir eisini til at selja fyri 250 kr. fermeturin og at keypari rindar fyri umskipan av lendi.

**Viðv. 292**
Tilmælini frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl 19:10

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen

Laila Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen